# Útvarpið roknar skeivt ...

**Útvarpið lýsir við eykavinningum í sambandi við, at V4 í november fyllir 50 ár. Men V4 fyllir kortini bara 40. Fyrsti V4-dráttur var 29. november 1969**

V4 DRÁTTUR
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Útvarpið hjá Kringvarpinum lýsir nú um dagarnar við eykavinningum í V4 í sambandi við, at V4 fyllir fimmti ár í november. Eykavinningarnir eru fimm ferðir 10.000 krónur.

Søgan um V4 er kortini tann, at fyrsti V4 drátturin var hin 29. november í 1969. Soleiðis fyllir V4 »bara« 40 ár 29. november.

Í vikuni fyri leygardagin 29. november í 1969 samtykti løgtingið endaligt at geva Útvarpi Føroya loyvi til serskilda happadráttin, og girokortið við V4 seðlinum – sum kostaði fimm krónur - varð sent í hvørt hús í Føroyum.

Annika Mittún Jacobsen, kringvarpsstjóri, viðgongur, at tey hava gjørt ein roknifeil – og at hann verður rættaður.

Fjøruti ára dagurin hjá V4 er fyrsta sunnudag í advent.



*Jógvan Arge og Jógvan Jespersen tá V4 fylti 25 ár í 1994*




# Jólatekningar hjá børnum at síggja í SMS

**Børn um alt landið hava verið við í kappingini at tekna jólaposan hjá SMS – og hesa vikuna verða tekningarnar sýndar fram á torginum í SMS**

JÓLAKEYP
*Eirikur Lindenskov*
*eirikur@sosialurin.fo*

Fram til leygardagin klokkan 16 ber til at síggja tekningarnar á Torginum í SMS. Tá verður eisini kunngjørt, hvør hevur vunnið kappingina um tekningina, sum prýðir 150.000 jólaposar hjá SMS. Vinnarin verður kosin millum tey umleið 1.000 børnini, sum hava verið við í kappingini í ár.

– Hetta við at bjóða út kapping um at tekna jólaposan hjá SMS er gamalt. Hugskotið spratt einaferð heilt afturi í 1980'unum. Hetta hevur verið ein sera spennandi kapping øll árini, og tað vísir áhugin eisini við teirri rættiliga góðu undirtøkuni, sum aftur í ár hevur verið millum børn at vera við í kappingini, sigur Karis við Brúgv, marknaðarleiðari í SMS.

Allar tær mongu tekningarnar vóru sjálvsagt atvoldin til, at dómsnevndin, mannað við trimum fakfólkum, eisini í ár hevur havt úr at gera við at døma og kjósa vinnaran í teknikappingini.

Tá ið tann víðagitni Jólabýurin í SMS letur upp mánadagin 16. november fer jólaposin at fáa.




**TØKK**

**Øllum tykkum sum á ymiskan hátt gjørdu mær 80-ára føðingardagin so sera hugnaligan takki eg hjartaliga**

**Johs. Berg**



SPEKT løggildir grannskoðarar

## Maskinmaður til Sp/f Tavuna

Fyri Sp/f Tavuna í Leirvík verður søkt eftir einum maskinmanni at byrja skjótast til ber.

Starvið umfatar dagliga røkt av øllum maskinum og amboðum, sum hoyra til eitt flakavirki, herundir flakamaskinur, frystarí og frystiútgerð. Umsøkjarin skal kunna arbeiða sjálvstøðugt.

Talan er eisini um skiftandi arbeiðstíðir orsakað av vaktarskipan.

Fyri rætta umsøkjaran er talan um eitt avbjóðandi og spennandi framtíðarstarv.

Lønin verður ásett eftir nærri avtalu við leiðsluna.

Umsóknin verður at senda til Sp/f Tavuna í Leirvík skjótast gjørligt og í seinasta lagi 20. november 2009.

Fleiri upplýsingar um starvið fáast við at venda sær til stjóran, Joen Magnus Rasmussen, á telefon 44 33 55.

Allir fyrispurningar og allar umsóknir verða viðgjørd í trúnaði.

Staravegur 17
Postsmoga 3258
110 Tórshavn

Telefon 34 34 34
Telefaks 34 34 35

spekt@spekt.fo
www.spekt.fo